# Skúladepilin í Hovi reistur

**Mikudagin var hátíðarhald í nýggja skúlabygningum í Hovi. Nýggi byggningurin er reistur og nógv fólk kom saman í komandi skúladeplinum í Suðuroynni**

SKÚLADEPIL
*Dagfinn Olsen*
*dagfinn@sosialurin.fo*

Í dýrdarveðrinum mikudagin varð skúladepilin í Hovi reistur. Hátíðarhald var í hesum sambandi og nógv fólk leitaði sær í nýggja skúlabygningin, har miðnámsskúli og heilsuskúli fara at húsast nakað skjótt.

Høvi var at skoða karmarnar og fólk tóktust samd um, at her vóru góðir karmar fyri framtíðarskúlagongd, men eisini fyri eittnú tiltøkum av ymsum slag, bæði mentanarligum, vinnuligum og øðrum slag.

Tvøroyrar Hornorkestur setti dám á við hornblástri og tað ljómaði væl í stóru høllini, har hátíðarhaldið fór fram. Mangar røður vóru á skránni. Landsstýriskvinnan í mentamálum, Kristina Háfoss segði seg fegnast um bygningin, sum hon metti fór at uppfylla tey krøv, ið eru til skúladepilin, og hon metti og vónaði, at eisini fór hetta at gerast savningarstað og karmur um tiltøk av ymsum slag.

Næmingaumboð høvdu eisini orðið. Leona L. Johannesen, næmingaráðsforkvinna í miðnámsskúlanum, og Erika Knudsen, næmingur á Heilsuskúla Føroya. Báðar nevndu tær trongu umstøðurnar, sum skúlarnir báðir virka undir, men at hetta tó skapar hugna og samanhald, og at dugnaligir lærarar hava fingið góða undirvísing í lag, hóast trongar karmar.

Jórun Petersen og Ole Laursen, skúlaleiðarar í ávíkavíst heilsuskúla og miðnámsskúla, hildu røðu og fegnaðust um nýggju karmarnar. Jórun vísti á, at hon hevur sjálv sum næmingur roynt trongu skúlakarmarnar hjá miðnámsskúlanum í Suðuroynni, og nú seinni hjá Heilsuskúlanum, nú hon er deildarleiðari har. Ole Laursen vísti á, at miðnámsskúli síðani sjeytiárini hevur verið í Suðuroynni, fyrst á Tvøroyri, síðani eisini í Vági. Tá vóru yvir 20 kilometrar millum skúlastovurnar, legði hann skemtandi afturat. Seinni hevur skúlin so húsast í Vági, men Ole fegnaðist um nýggja bygningin, sum ein fyrrverandi næmingur í miðnámsskúalnum, Páll Lave, hevur teknað, og tað frøddist skúlaleiðarin sjálvsagt eisini um.

Jóannes Eidesgaard, løgmaður, fegnaðist eisini um, at skúlarnir loksins fáa góðar karmar, og hann fegnaðist um, at ferðasamabandið í Suðuroynni nú er so gott, at Hov er sum ein miðdepil, sum ein býlingur í Vági ella á Tvøroyri.

Skúlarnir báðir hava havt trongar umstøður, men nýggi og stásiligi bygningurin ber boð um aðrar tíðir. Fyrst varð grivið út fyri skálanum í Vági, síðani í Hovi, og tó at hann liggur beint omanfyri Hovsbygd, so stendur hann sunnanfyri Hovsá, og er tískil í veruleikanum í Porkeris kommunu, ´Tískil hevur nógv verið tosað í Suðuroynnni um, hvussu skúladepilin skal kallast, tí sum so liggur hann ikki í Hovi, men í Porkeris kommunu. Økið, har skúlin stendur, hevur verið nevnt í Heiðunum, so neutralar røddir hava nevnt, at ein møguleiki er at nevna skúlan fyri Skúladepilin í Heiðunum. Livst, so spyrst.



*Nýggi skúladepilin í Hovi tekur seg væl út í landslagnum*

# Sparikassi stuðlar svimjing

**Mikukvøldið skrivaðu SuSvim og Suðuroyar Sparikassi undir stuðulsavtalu**

STUÐUL
*dagfinn@sosialurin.fo Dagfinn Olsen*

Mikukvøldið hevði Suðuroyar Sparikassi aðalfund. Undir aðalfundinum fór eisini fram undirskriving av stuðulsavtalu. Pál Joensen og SuSvim og Suðuroyar Sparikassi hava gjørt avtalu, har Suðuroyar Sparikassi er ein av høvuðsstuðlunum hjá Suðuroyar Svimjifelag.

Teresa Jensen frá marknaðardeildini hjá sparikassanum segði, at Suðuroyar Sparikassi í mong ár hevur verið stuðul hjá svimjingini og at tey fegnast um at halda fram við samstarvinum.



*Lars Djurhuus, nevndarformaður í Suðuroyar Sparikassa, Pál Joensen, svimjari, Reidar Simonsen frá SuSvim, og Teresa Jensen frá Suðuroyar Sparikassa*
*Mynd: Reidar Simonsen*



# Vatnlitir í Oynni

**Gallarí Oyggin hevur í hesum døgum framsýning við norðurlendskum listafólkum**

LIST
*Dagfinn Olsen*
*dagfinn@sosialurin.fo*

Vatnlitsmyndir við føroyskum myndevnum. Soleiðis kann framsýningin stutt lysast. Tað er Gallarí Oyggin á Tvøroyri, ið hevur fingið hesa framsýning í lag. Norðurlendsk listafólk sýna fram og felags er, at tey mála vatnlitsmyndir. Og í stóran mun eru myndevnini føroysk.

Morten Paulsen úr Noreg, Karen Friman og Maria Gautier úr Svøríki og Hartvig Stenholt Hansen úr Danmark sýna fram í Gallarí Oynni.

Hartvig Stenholt Hansen var til staðar, tá sýningin lat upp týsdagin. Hann segði, at tey sum listafólk eru hugtikin av Føroyum og at her fáa tey íblástur. Myndirnar bera eisini boð um, at eittnú ljósið og litirnirgeva listafólkunum hug at mála.

Gallarí Oyggin hýsir framsýningini til 3. mai, men Palle Julsgart sigur, at væntandi verða aðrar framsýningar á skránni í summar.